# Lærlingur til byggimarknaðin í

360°

Vit søkja eftir lærlingi til byggimarknaðin at byrja skjótast gjørligt.

Í lærutíðini fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving/arbeiðsgongd innan handil.

Í 360° starvast 20 fólk, og sum lærlingur fært tú innlit í alskynd viðurskifti viðvíkjandi kundarøkt, sølu og innkeypi.

**Førleikakrøv:**
Tað er eitt krav, at lærlingurin hevur FHS-útbúgving, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og annars ert fyrikomandi og røkin.

Meira fæst at vita um starvið á tlf: 510808

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn, skal vera okkum í hendi innan 15. August. Umsóknin skal sendast til:

360°

Postsmoga 3268 · 110 Tórshavn

veitst tú ikki tað?

Sosialurin

**Mentamálaráðið**
FÓLKASKÚLADEILDIN

## Fulltrúi til dagstovnaøkið

Vit sóknast eftir einum dugnaligum og ágrýtnum fulltrúa til nýtt og spennandi starvsøki í Mentamálaráðnum til setanar skjótast gjørligt.

**Starvið**
Í Fólkaskúladeildini er eitt áhugavert, spennandi og fjølbroytt starv sum fulltrúi leyst at søkja. Tann, ið settur verður, skal m.a. taka sær av framhaldandi menning av økinum, av yvirskipaða eftirlitinum í sambandi við dagstovnalógina og ráðgeva kommunum, ið umsita dagstovnar og dagrøktir sambært dagstovnalógini.

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a., at:

- fyrisita og tryggja menning á dagrøktar- og dagstovnaøkinum
- veita kommunum ráðgeving og vegleiðing í øllum umsitingarligum fyriskipanum, ið verða ásettar
- tryggja at skifti frá dagstovni til fólkaskúla verður so trygt fyri einstaka barnið sum gjørligt
- útvega og greina hagtøl
- fremja samstarv við kommunur og ráð, ið økið varðar av
- hava eftirlit við, at kommunur umsita lógina um dagstovnar og dagrøkt sambært dagstovnalógini
- taka lut í verkætlanum, her ímillum eisini verkætlanarleiðslu, og
- røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur, sum verða lagdar til fulltrúan

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at arbeiðsgongdir eru í samsvari við galdandi reglur og visjón ráðsins.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal:

- hava útbúgving úr lærdum háskúla
- duga at samstarva, arbeiða sjálvstøðugt og í tvørgangandi verkætlanarbólkum
- vera tænastusinnaður, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir.

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politiska myndugleikanum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan. Mentamálaráðið arbeiðir við visjónum og er týðandi partur av visjón 2015.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini og Løgmansskrivstovuna.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 21. august 2008, kl. 12.00.
Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Olaus Jespersen, deildarstjóra, á tlf. 355045 ella á 555045.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.



HTM er stovnur undir Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek.
Í løtuni starvast 12 fólk á HTM.
Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.

- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar
- tvørfakligt samstarv – innan- og uttanhýsis

# Goymslufólk
## til Hjálpartólamiðstøðina

Ert tú maður/kvinna, sum hevur tú hug at arbeiða á einum almennum stovni, har arbeiðsdagurin ikki stendur stillur og uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar – ja so hava vit júst brúk fyri tær!

Á HTM er eitt fulltíðarstarv á goymsluni leyst at seta 1. september ella sum skjótast.

Høvuðsinnihaldið í starvinum er

- skipan av goymslu
- avgreiðsla av hjálpartólum
- skráseting av hjálpartólum

Annars eru uppgávurnar

- smávegis umvælingar av hjálpartólum
- reingerð av endurnýtsluhjálpartólum
- annað fyrifallandi arbeiði

Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur

- royndir frá líknandi arbeiði
- góðan ordan
- góð samstarvsevnir
- kunnleika til teldur á brúkarastøði
- áhuga at arbeiða við hjálpartólum

Vit kunnu bjóða

- fast starv
- flextíð
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- førleikamenning

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til:
Hjálpartólamiðstøðina
Postboks 1049
110 Tórshavn

ella við telduposti til:
htm@almannastovan.fo

Umsóknarfreist
18. august 2008 kl. 14.00.

KREA

htm
htm@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo